# Strok & Snirr

So er barna- og ungdómsblaðið Strok & Snirr aftur í skúlunum og í leysasølu!

Nú eru tvey ár síðan, at 45 ára gamla Barnablaðið varð hamskift: Blaðstjórnin setti sær fyri at gera blaðið meira nútíðarhóskandi, og fyrsta kravið var tá, at tað skuldi vera í litum, alt sum tað var. Síðan skuldi tað býtast sundur soleiðis, at tað skilliga vendi sær bæði til teir yngru og eldru børnini. Hetta varð gjørt við at gera blaðið sum tvey bløð í einum við hvør sínum heiti: Snirr til tey yngru, og Strok til tey eldru. Byrjar tú úr øðrum endanum, eitur blaðið t.d. Strok, men tá ið tú ert komin á opnuna í miðjuni, mást tú venda blaðnum á høvdið, og byrjar tú aftur fremst, er blaðið Snirr. Á opnuni í miðjuni er ynskimyndin, sum øll kunnu ynskja sær. Í fyrsta blaðnum hesuferð er mynd av einum fittum hundi, og í tí næsta blaðnum verður tað sangbólkurin Westlife. Hesar myndir hava lesararnir sjálvir valt.

Innihaldið er sera fjølbroytt: Í hvørjum Stroki er nakrar síður um okkurt serligt evni, har vit eisini práta við fakfólk og ung. Hesuferð snýr tað seg um at standa á tónleikapalli og syngja ella spæla. Tíðindafróða sigur tíðindi úr øllum herðarhornum, og afturvendandi eru forvitnisligar frásagnir úr søguni, Blits – súrt og søtt um tey kendu, uppgávusíður, gaman, teknisøgur, krossorðagáta o.m.a.

Í Snirri sigur Tíðindafróði tíðindi, Gløggi Blokk greiðir frá ymiskum vísindaligum, hesuferð um alnótina, har eru søgur, teknisøgur, úr bíbliusøguni, fleiri uppgávusíður o.m.a. Í fleiri førum ber til at senda loysnir inn og sostatt vera við í lutakasti um at vinna fløgur, ymiskar bøkur o.a.

Aftur í ár verður skipað fyri haldarakapping við stórum vinningi: Ein av teimum nýggju Sony-playstation á jólum, og so verður aftur stórur vinningur komandi summar. Umframt hesar vinningar eru 4 smærri vinningar frá Føroya Bjór at vinna í hvørjum blaði.

Blaðið kemur út 8 ferðir í skúlaárinum, tað er 40 bls. í litum. Tey flestu tekna seg sum hald arar í skúlunum, og tá er haldaragjaldið kr. 120 fyri alt skúlaárið. Tað ber eisini til at fáa blaðið sendandi við postinum. Tá kostar tað kr. 120 + postgjald. Snirr & Strok verður eisini at fáa í bókhandlum og stórum kioskum fyri 20 kr. blaðið.

Snirr & Strok verður umbrotið, prentað og heft á Pf. Dimmalætting.

Í blaðstjórnini eru Niels Jákup Thomsen, blaðstj., Beinta Johannessen, Jonna Olsen og Eyðna Magnussen.

# Erik Olsen í Smiðjuni í dag

*Rituvíkingurin Erik Olsen, sum hevur búð í Íslandi og Danmark síðstu mongu árini, letur seinnapartin í dag upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.*



Talan er um prýðislutir og brúkslist úr kopari, stáli, granitti og øðrum tilfari, ið verða sýndir fram undir merkinum »Erik Olsen Design«, og eru lutirnir á framsýningini yvir 50 í tali.

Síðstu 10-15 árini hevur Erik Olsen miðvíst arbeitt við at gera ymsar lutir úr komprimeraðum stáli og kopari og granitti, og gjarna leggur hann stóran dent á, at skap, litir og funktión skulu ganga upp í eina hægri eind, samstundis sum handverksliga dygdin hevur nógv at siga.

»Erik Olsen Design« fevnir í dag um alt frá fleiri røðum av ljósastakum og skálum til borð, stólar og spegl, har omanfyri nevnda tilfar er afturvendandi í øllum listaverkunum.

Bygdamaðurin hjá Eriki, Hans Tausen Olsen, býráðslimur í Runavík, fer í dag kl. 17 at seta framsýningina, sum verður opin komandi tvær vikurnar, til sunnudagin 24. september — hvønn dag frá kl. 14 til 20.

**Orðaskifti:**

# Skrivið á føroyskum tað er best fyri Føroyar!

Fyri kortum sendi landsstýrismaður eitt skriv til ráðharra í Danmark - á føroyskum - sjálvandi!

Men spurningurin er um tað er so klókt. Tí vandi er fyri, at móttakarin als ikki dugir at lesa brævið.

### Loysingarpolitikkur

At loysingarsamgongan nú krevur, at øll onnur skulu lesa føroyskt og helst eisini svara okkum aftur á føroyskum, eru sjálvandi øll her á landi glað ivir. Tí nú má vera liðugt hjá okkum at læra okkum nakað fremmant mál. Vit kunnu hereftir blaka allar útlendskar bøkur burtur, ella brenna tær - spilluna - sum onkur gjørdi fyri nøkrum árum síðani. Øll hini kunnu bert læra seg føroyskt, og tey kunnu byrja við ð.

### Fíggjarligur møguleiki?

Møguliga kann mentamálaráðharrin bjarga fullveldiskollapsinum fíggjarliga, við at geva skeið á føroyskum til allar milliónirnar av fólkum, ið nú koma higar at læra seg føroyskt, av tí at landstýrið nú er farið at „kommunikera“ á føroyskum máli á „internationala leikpallinum“.

### Stokkut var gleðin

*Men „tíverri“ skuffaði Landsstýrið álvarsliga. Í Dimmu ídag er at lesa eitt* skriv frá Føroya Landstýri - á enskum máli. *Tað hevði lyndi at trútna kring eyguni!*



*Ein spyr seg sjálvan, hvat meiningin er? Hví svíkir loysingar landsstýrið føroyska málið á slíkan hátt? Mitt í fullveldissvansinum? Er nakað í vegin við at senda eitt skriv til NATO ovastan* á føroyskum?.

Eg vil so vóna, at ST aðalskrivarin, Kofi Annan, fekk skrivið frá føroya landsstýri á skærum føroyskum máli! Í hesi loysingartíð kunnu vit rokna við, at tá ið ein danskur ráðharri kann lesa føroyskt, so kunnu bæði NATO ovastin og ST aðalskrivarin enn betur lesa føroyskt. Tí í eini fullveldistíð er danin tann býttasti av teimum trimum. Og uttan nakað kjak stendur føroyingurin omanfyri allar og øll hini.

### Áheitan

Sum Sambandsmaður fari eg hervið at heita á Føroya Landstýri um at kommunikera við øll útlendsk lond og stjórnir á føroyskum máli - bæði í skrift og talu. Tað tænir føroysku tjóðini best. Tað hava úrslitini higartil víst.

**Vinarliga Marjus Dam,**
**Løgtingsmaður**

# Nýtt bræv til S.T.

Vit skulu loyva okkum at vísa til brævaskifti um samráðingarnar millum Føroyar og Danmark um at skipa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt ríki, nevnliga bræv til tygara frá løgmansdeildini í føroysku stjórnini, skjal nr. 400-01-0002/2000, dagsett 26. juli 2000, bræv somuleiðis til tygara frá danska uttanríkisráðharranum, skjal nr. JT.1, 8.H.36, dagsett 23. august 2000, eins og bræv tygara til løgmansdeildina í føroysku stjórnini, dagsett 29. august 2000. Eisini skulu vit vísa til bræv okkara til aðalskrivara tygara, dagsett 10. februar 1996, har vit vegna 3094 borgarar í ríki okkara gjørdu vart við, at Danmark í stríð við altjóða sáttmálar, sum tað sjálvt hevur undirritað, viðger okkum sum eina koloni. Avrit av hesum seinast nevnda brævi er, eins og tygum kunnugt, sent til øll limalondini í ST.

Danski uttanríkisráðharrin sigur í sínum brævi, at Føroyar eru ein partur av tí danska kongsríkinum. Tað undrar okkum, at danska stjórnin boðar alheimssamfelagnum frá hesum, tí sum vit hava greitt frá í nevnda brævi okkara, boðaði sama danska stjórnin tann 14. september 1995 okkum frá, at hon ikki megnaði at siga, nær og hvussu Føroyar eftir 14. januar 1814 vóru vorðnar ein partur av Danmarkar ríki. Men tá Danmark ikki kann siga, nær ið hetta skal vera farið fram, ber hetta við sær, at einasta heimildin, danska stjórnin hevur til at umboða okkum mótvegis umheiminum, er tann sáttmáli, sum vit gjørdu við Danmark tann 29. august 1450. Hesin sáttmálin ásetur, at partarnir hava somu rættindi og skyldur í felagsskapinum. Tað sum Danmark gjørdi við brævi sínum til okkara í 1995, var at bróta henda sáttmála. Danmark sýtti okkum nevnliga at fáa ein tjóðfund, sum skuldi gera av, hvussu vit skuldu stýra ríki okkara, eins og danska tjóðin hevur rætt til at stýra sínum. Hervið fór Danmark við okkum sum við eini koloni, men heldur ikki koloniir eru partar av tí veldi, sum umboðar tær í altjóða samskifti. Tað er tí heimildarleyst at danski uttanríkisráðharrin boðar ST frá, at Føroyar eru ein partur av danska kongsríkinum.

Síðan ST-felagsskapurin varð stovnaður hevur hann barst fyri, at koloniir skulu sleppa at fáa ræði á egnum viðurskiftum, og sum føroyska stjórnin hevur boðað frá við brævi sínum dagsettum 26. juli, hava Føroyar nú sett sær fyri at fáa hetta ræði. Við brævi sínum dagsettum 23. august játtar danska stjórin sjálv, at hon hevur tikið upp samráðingar við føroysku stjórnina um, at Føroyar skulu gerast sjálvstøðugt ríki.

Um so var, at danska stjórnin ikki hevði brotið tann sáttmála, sum er um viðurskiftini millum okkum og danska ríkið, so høvdu vit heimild til at hava eitt ávíst samskifti við altjóða samfelagið, tí tann sáttmálin áleggur okkum bert skyldu til at vera saman við Danmark í kríggi. Men nú, danska stjórnin viðger okkum sum eina koloni, og samstundis góðkennir, at vit kunnu gerast sjálvstøðugt ríki, hevur danska stjórnin eftir øllum ásetingum í altjóða rætti givið okkum loyvi til at fyrireika stovnssetingina av einum nýggjum ríki. Ein natúrligur partur av hesum arbeiði er at seta seg í samband við onnur ríki og sjálvsagt somuleiðis við ST.

Tað undrar okkum tí almikið, at danska stjórnin skal siga ST frá, at føroyska stjórnin ikki hevur nakra heimild til at seta seg í samband við altjóða samfelagið, tí hesa heimild hevur Danmark sjálvt givið føroysku stjórnini við at taka upp samráðingar við hana um at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki.

Ein av teimum skyldum, sum koloniveldini hava mótvegis kolonium sínum, er at geva teimum eitt frælst val um tilknýti uttan at nakað fíggjarligt trýst verður framt. Men í teimum samráðingum, sum higartil hava verið millum føroysku og donsku stjórnina, hevur danska stjórnin boðað frá, at hon ikki hevur í hyggju at fylgja hesi altjóða reglu, men vil síggja til, at lívskorini í Føroyum versna við 20%, um Føroyar gerast sjálvstøðugt ríki.

Orsøkin til, at danska stjórnin hevur møguleika til at hótta á slíkan hátt, er at í 1946 var ein fólkaatkvøða í Føroyum har ein greiður meiriluti samtykti, at Føroyar skuldu gerast sjálvstøðugt ríki. Fyri at forða fyri at hetta gjørdist veruleiki, setti danska stjórnin eina ætlan í verk, sum hevði til endamáls at Føroyar skuldi gerast ósjálvbjargnar. Hetta varð gjørt við at danska stjórnin galt ein part av føroysku fíggjarlógini. Avleiðingarnar av hesum politikki hava verið, at Føroyar, sum í 1946 var tað ríkasta av Norðurlondum, nú eru tað fátækasta av hesum londum. Við nú at bróta sína altjóða skyldu til at hjálpa okkum burtur úr hesi mannminkandi støðu, sum er úrslit av miðvísum donskum politikki, vónar danska stjórnin, at samráðingarúrslitið verður so vánaligt, at tað ikki verður samtykt av føroyska fólkinum.

Men tað Danmark hevur altjóða skyldu til, er at geva okkum eina fíggjarliga skipan, so at vit fara at hava eitt frítt val. Tað er hesa skyldu, sum Danmark ikki hevur hildið í teimum samráðingum, sum higartil hava verið millum partarnar, og tí taka vit fult út undir við, at stjórn okkara vendir sær til ST fyri at fáa greiði á hesum máli.

**Vinarligast**
**Vegna**
**Fólkaítakið fyri**
**tjóðfundi**



# Persónbilatalið vaksið 25 prosent

*Ein av stóru broytingunum við kollektivu ferðsluni í Føroyum er, at persónbilatalið er vaksið við 1.771 bilum - 25% síðani 1994*

Eirikur Lindenskov

Bussarnir hjá Bygdaleiðum eru í ringum standi. Hetta verður staðfest í kanningin hjá Strandferðsluni um Bygdaleiðir.

– Miðalaldurin á buss-unum er 11 ár, og má tað metast at verða ov høgt, staðfestir kanningin. 61% av bussunum eru yvir 12 ár, og teimum tørva stórar ábøtur ella eiga at vera skftir út. Hetta hevur m. a. við sær stórar útreiðslur til viðlíkahald og renoveringar. Bara 26% av bussunum eru í so góðum standi, at teir ikki krevja ábøtur.

### Nakað væl eftir á mál

Seinastu trý árini eru nakrir bussar skiftir út, í førum, tí tað beinleiðis var neyðugt fyri, at raksturin ikki skuldi steðga upp. Støðan er tí bøtt eitt sindur við útskiftingum, men nakað væl er eftir á mál.

Útskiftingar av bussum, sum standa fyri framman, hava við sær stórar útreiðsluhækkingar til rentur og avskrivingar, um so er, at núverandi rakstrarskipan heldur fram.

Nógvir partar eru, sum í felag eiga at samstarva fyri at skapa nøktandi karmar fyri at reka kollektiva ferðslu. Hetta samstarv eigur at virka betur, heldur Strandferðslan.

Umframt bussarnar, so eru heldur ikki allir vegirnir nóg forsvarligir at flyta fólk eftir, og mælir Strandferðslan til, at stig verða tikin til at fremja neyðugar broytingar og ábøtur.



*Kanningin hjá Strandferðsluni um Bygdaleiðir mælir m. a. til, at fyrireika formligar karmar hjá Strandferðsluni at virka innanfyri*

**savnsmynd**

### Barnagarðar krevja nógv

Flest allir brúkarar av Bygdaleiðum fáa sersømdir í sambandi við gjald av flutningi. Hetta verður seg við mánaðarkortum, skúlakortum o. l., sum geva sera stóran avsláttur. Børn undir sjey ár fáa fría ferðing og verður hetta nógv brúkt, eitt nú av barnagørðum. Av tí, at tað antin er lutfalsliga bíligt at ferðast ella frítt at ferðast, so verður eftirspurningurin størri, verður sagt í frágreiðingin hjá Strandferðsluni um Bygdaleiðir, og tí mugu stór og kostnaðarmikil anlegg verða til taks.

Afturat hesum verður viðmerkt, at Strandferðslan í fleiri førum noyðist at keypa bussar størri enn miðal nýtsluprosentini vísa, at tørvur er á. hetta kemst av, at tað til ávísar tíðir eru fleiri ferðandi, sum samstundis skulu brúka flutning, t. d. til og frá arbeiði og skúlanum, meðan tað í millum hesi tíðarskeið er lítið og einki at flyta.

Kapasiteturin er í nøkrum økjum í landinum ov stórur í mun til íbúgvaratalið. Nýtsluprosentini fyri flestu farleiðirnar eru sera lá, t. v. s. at bussarnir sum heild verða illa útnyttaðir.

Vísandi til íbúgvaraviðurskiftini í útjaðaranum er kundagrundarlagið hjá Bygdaleiðum avmarkað. Tað er tí ikki hugsandi, at verandi inntøkugrundarlag verður betri orsakað av fleiri kundum í útjaðaranum. Framtíðar kundagrundarlagið verður eisini merkt av, í hvønn mun tað almenna leggur ein samferðslupolitikk, ið stuðalr kollektivari ferðslu.

Bygdaleiðir eru í einiari slíkari marknaðarstøðu, at neyðugt er við ymsum strategiskum tiltøkum. Tørvur verður á at gera umskipanir, eitt nú broyta rakstrarform og gera rationaliseringar og effektiviseringar á øllum økjum.

Seinstu árini eru hendar stórar broytingar á marknaðinum innan kollektiva ferðslu. Í tíðarskeiðnum 1994-1999 er talið av persónakførum í útjaðaranum vaksið við heili 1.771 ella 25%. Henda gongdin hevur sera stóra negativa ávirkan á raksturin og nýtsluprosentini á Bygdaleiðum. Samstundis er busskapasiteturin í landinum vaksin nógv, og hevur hetta havt við sær størri kapping innan serflutning.

Spurningurin er, um tað almenna í størri mun eigur at verða við til at broyta hugburðin hjá fólki, soleiðis at alt fleiri velja at brúka kollektiva ferðslu, hetta við atliti til samfelagsbúskapin, umhvørvið, viðlíkahald av vegum, íløgur í anlegg o. a.

# Karmarnir um kollektivu ferðsluna ótíðarhóskandi

*Í drúgvari kanning frá Strandferðsluni um Bygdaleiðir verður m. a. stafest, at karmarnir um kollektivu ferðsluna ikki eru endurskoðaðir seinastu 20 árini*

Eirikur Lindenskov

Í síðstu viku lat Strandferðslan landsstýrismanninum í samferðslumálum, Bjarna Djurholm eina drúgva frágreiðing um Bygdaleiðir, har stovnurin mælir landsstýrismanninum sum skjótast at fyrireika formligar karmar hjá Strandferðsluni at virka innanfyri, herundir eisini Bygdaleiðir, at orða ein samferðslupolitikk, herundir politikk um kollektiva ferðslu og viðgerð av frágreiðingini um Karmar fyri framtíðar virkseminum, sum frágreiðingin kallast.

Í arbeiðsbólkinum hava umframt Reidar Nónfjall, stjóri eisini sitið Heri Joensen fólkaflutningleiðari og Helgi Nielsen, roknskaparleiðari.

Í frágreiðingini sigur Strandferðslan, at formligu karmarnir um kollektivu ferðsluna í Føroyum eru ótríðarhóskandi, og at teir ikki eru endurskoðaðir tey seinastu 20 árini. Tað er neyðugt, at virksemið innan kollektiva ferðslu verður lagt í støðugar karmar soleiðis, at eitt málrættað arbeiði kann gerast fyri at menna henda partin av tænastunum hjá tí almenna.

Tað verður eisini staðfest, at galdandi sáttmaáttmálar um busskoyring eru ikki nøktandi. Teir eru ógreiðir og eru ikki í nóg stóran mun til fyrimuns fyri landið. Tað er eisini ov trupult hjá øðrum arbeiðstakarum at koma inn á marknaðin fyri rutukoyring, og at henda skipan tí kann virka avlagandi upp á kappingina.

Koyrisáttmálarnir hava í hesum fimm ára skeiði havt við sær bruttoútreiðslur upp á tilsamans um 100 milliónir krónur. Sáttmálarnir eru bindandi, men eru SL kunnugt ikki góðkendir av landsstýrinum og tað fyriliggur heldur eingin lógarheimild til at binda landskassan á henda hátt fíggjarliga. Harafturat er busskoyringin ongantíð boðin út í almennari kapping, sum er við til at tryggja bestu og bíligastu tænastuna.

Næstan øll feløgini hava bara ein buss og gevur hetta m. a. ongar stórrakstrarfyrimyndir, við atliti til útnyttan av kapasiteti, effektivan rakstur, fyrisiting, innkeyp av eykalutum, viðlíkahald o. ø. Hetta er við til at dýrka avtalurnar munandi, sigur frágreiðingin frá Strandferðsluni.

Galdandi sáttmálar fara úr gildi 31. desember í ár.

# Góður fiskiskapur eystanfyri

*»Sundaberg« hevur 600 tons inni í flaki eftir fiskiskap í 2 mánaðir*

Ólavur í Beiti

Fiskiskapurin eystan fyri hevur verið rættiliga góður seinastu tíðina. Í nakrar dagar yvir 2 mánaðir hevur »Sundaberg« fiskað nakað yvir 600 tons, so talan hevur verið um rokfiskiskap hjá »Sundaberg«.

Tá ið vit høvdu stjóran í JFK Trol, Hanus Hansen, í telefonini, hevði hann júst tosa við »Sundaberg«, og sum skiltist, hevði ikki verið so nógv at fingið seinasta døgnið. »Sundaberg« tekur eini 900 tons.

### Tvey loyvir

Síðan JFK Trol seldi »Skálaberg« til Grønlands hevur felagið tvey loyvir og bert ein trolara, so »Sundaberg« hevur nóg mikið av kvotu.

Skuldi staðið á at fiska kvotuna hjá »Sundaberg«, er »Sjúrðraberg« tøkur. Í løtuni fiskar »Sjúðraberg« rækjur á Flemmish Kap og hevði gott 300 tons í lastini.

»Enniberg« og »Akraberg« eru eisini eystanfyri.

